UNITED seafood

Maskinmaður

United Seafood søkir eftir maskinmanni til virkið í Tórshavn.

United Seafood Tórshavn framleiður serliga tosk og upsa. Vørurnar ið virkaðar verða eru á høgum góðskustigið og fevna um m.a. catering og retail vørur eins og frystar ídnaðarvørur. Arbeiðið á United Seafood í Tórshavn fer fram sambært innaneftirlitsskipan.
Í 2003 virkaði virkið um 5.000 tons av rávøru, og uml. 3000 tons av góðskaðum vørum

Uppgávurnar hjá maskinmanninum verða m.a.:
- Røkja maskinur á virkinum
- Røkja viðlíkahaldsætlan virkisins

Krav er at umsøkjari hevur:
- Prógv sum maskinsmiðjur

Fyrimun hevur umsøkjari ið hevur:
- Góðan førleika innan el-skipanir
- Kunnleika til flakamaskinur
- Kunnleika til teldunýtslu
- Royndir frá líknandi arbeiði

Vit kunna bjóða:
- Eitt framkomið fakligt umhvørvi
- Eitt virkið og framkomið framleiðsluumhvørvi
- Løn sambært avtalu

Vit kunna bjóða eitt arbeiði í mennandi og spennandi umhvørvi við góðum umstøðum.
Umsóknarfreistin er 15. november.
Allar umsøknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Ynski er at viðkomandi kann byrja sum skjótast.

Um áhugi er fyri hesum starvi so kunna tygum taka samband við :

UNITED SEAFOOD
att : Klæmint Klein.
Postboks 218.
FO - 110 Tórshavn, Føroyar.
Telefon : 355555.
Telefax : 312631.

Landssjúkrahúsið
FO 100 Tórshavn

Sjúkrarøktar-frøðingur

Á **G4** er hesi størv sum sjúkrarøktarfrøðingur leys at søkja:

- eitt fast heiltíðarstarv í skiftandi vaktum til setan 1. januar 2005
- eitt fast starv á starvsbrøki 0,8 í skiftandi vakt-um til setan 1. januar 2005

Deildin er ein kirurgisk deild við servitan innan ortopæði, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum, gynækologiskum, eyga, oyra, nøs og hálsasjúkum. Á deildini er pláss fyri 24 sjúklingum.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Elin Vitalis, deildarleiðara á G4 á telefon 304500, lokal 5064.

Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingi:
- sum hevur prógv og góðkenning sum sjúkra-røktarfrøðingur
- sum hevur fakliga vitan og royndir innan kirurgiskari sjúkrarøkt
- við fleksibiliteti og góðum samstarvsevnum
- er opin og positiv
- sum vil søkja mennandi avbjóðingar

Setanartreytir:
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 6. desember 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn í brævbjálva merktur "umsókn til starv" við CV, autorisatión, avrit av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

Landssjúkrahúsið
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"

Landssjúkrahúsið
FO 100 Tórshavn

Sosialráðgevi til økispsykiatriina

Á økispsykiatrisku deildini er fast fulltíðarstarv sum sosialráðgevi leyst at søkja til setan 1. desember 2004 ella eftir avtalu.

Talan er um nýtt starv í samband við, at farið verður undir økispsykiatriskt virksemi. Viðkomandi, ið sett/ur verður, kemur at arbeiða bæði á sjálvum deplinum og úti í økjunum, í tøttum samstarvi við verandi sosialráðgeva og onnur starvsfólk á deplinum og í økjunum.

Førleikakrøv
- útbúgving sum sosialráðgevi við minst 2 ára starvsroyndum
- góð samstarvsevni, ídni, hug og dirvi til at luttaka í einum sera fjøltáttaðum arbeiði saman við øðrum fakbólkum
- førleiki og royndir til at fremja sjálvstøðugt virksemi
- fakligur áhugi innan psykiatriska økið, umframt at verða við í menningini av psykiatriska arbeiðinum á deplinum og úti í økjunum.
- teldukunnleiki

Vit kunnu bjóða
- eitt spennandi arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum.
- skeið/eftirútbúgving innan- og uttanhýsis, sum psyk. depilin/økispsykiatriska deildin skipa fyri

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til deildarleiðaran á økispspsykiatrisku deildini, Ænа Reinert, telefon 304500, lokal 4130, e-post ana.reinert@lsh.fo, sosialráðgevan, Magnus Isaksen, lokal 4160, e-post mais@lsh.fo ella leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin, Bergit Weihe, lokal 4102, e-post bergitw@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 15. november 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt "umsókn til starv" við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

Landssjúkrahúsið
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"

Minningarhald í Fuglafirði

1. november kl. 14.00 verður minningarhald við minnisvarðan.
Kristian Martin Petersen, grannskoðari, hevur bønarhald.

Nevndin

Epileptikarafelag Føroya

Ársaðalfundur verður í MBF-húsinum mikukvøldið 1. desember 2004, kl. 18.00.

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

Nevndin

Kavarar søkjast

Søkt verður eftir tveimum kavarum at arbeiða í Suðuroynni.

HSE part 1 ella líknandi útbúgving krevst.

Umsóknir verða at senda til:

S.J.H. Commertial Divers
Velbastaðvegur 42
100 Tórshavn

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

Føroya Blindastovnur

Vikarur fyri ergoterapeut

Føroya blindastovnur søkir vikar fyri ergoterapeut, fulla tíð, í tíðarskeiðnum 1. januar 2005 – 31. december 2005

Fremstu arbeiðsuppgávurnar eru:
- Málsviðgerð í sambandi við umsóknir um hjálpartól.
- Ítrivsarbeiði
- Undirvísing
- Leggja til rættis skeið og onnur felagstiltøk.

Vit sóknast eftir einum persóni sum:
- Kann arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur hug at arbeiða við ítrivsarbeiði.
- Er uppfinnsamur, ábyrgdarfullur og fleksibul.
- Er engageraður og vælhýrdur.
- Hevur telduførleika á brúkarastøði.

Vit bjóða:
- Møguleikar at seta tín egna dám á arbeiðið.
- Spennandi og fjølbroyttar uppgávur.
- Góðar starvsfelagar og gott arbeiðsumhvørvi.

Løn og setunarviðurskifti sambært galdandi sáttmála millum Ergoterapeutfelagið og Føroya landsstýri.

Meira fæst at vita við at venda sær til:
Karin Kass leiðara á tlf. 31 82 22
ella Marjun Jóanesardóttir, ergoterapeut,
tlf. 31 81 23 .

Umsókn og onnur skjøl skulu sendast til:
Føroya Blindastovnur,
Postboks 2074,
FO -165 Argir.

Umsóknarfreist 15. november 2004



BASALT

Aftur í ár verður
Jólasølustevna á Giljanesi
27. - 28. november 2004

Teir handlar, fyritøkur og onnur, sum ætla at verða við, verða biðin um at siga frá á tel. 222 411

MIÐVÁGS RÓÐRARFELAG

KEYP SPORTSFELGUR...



...við dekkum á alnótini



WWW.NORMEK.FO
FO-512 NORDRAGØTA
TEL 44 20 02 · FAX 44 20 22

HØSILAGE

Ein natúrlig grovfóðurvøra

Wrapballir í sera góðari góðsku.

Fóðuranalysa fylgir við hvørjari sending.

Vit skipa fegin fyri levering.

Ågård Fourage ApS
Kornmarken 15 · 6064 Egtved
Tlf. 0045 75 38 96 60
www.ågårdmaskinstationn.com

Kunngerð

til
veljarar í Sands Kommunu
til kommunuvalið 9. november 2004

Valstað:
Valið fer fram í Ungmannafelagshúsinum Virkinum heima á Sandi.
Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20.00, ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

Heimaval:
Veljarar, sum vegna sjúku ella annað ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri valið.
Vinarliga boða frá á kommunuskrivstovuni, tlf. 361034, ella hjá valnevndini, tlf. 361830.

Brævatkvøður:
Brævatkvøður kunnu avgreiðast á kommunuskrivstovuni. Opið er kl. 13.30–17.00.

Valnevndin
í Sands Kommunu

DVEYLAN
Gólv- og vegg vask

- Vinyl
- Linolium
- Flísar
- Teppir
- Veggir

J.C. Svabosgøta 50
100 Tórshavn
Tlf. 31 41 75

Lesið
Sosialin
-tað loysir seg

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Dagstovnurin í Øksnagerði

Í dagstovninum ganga 62 børn. Stovnurin er skipaður við eini vøggustovu við 12 børnum, tveimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari serstovu við 9 børnum. Á stovninum starvast 19 starvsfólk.

www.torshavn.fo

Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

Dagstovnin í Øksnagerði eftir:
- einum hjálparfólki til barnagarðsstovu at starvast 33 tímar um vikuna at byrja 3. januar 2005 ella eftir nærri avtalu. Tann, ið settur verður kemur at arbeiða saman við tveimum pedagogum

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Jesper Roos, stovnsleiðara tlf. 319959, fart. 219959

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Dagstovninum í Øksnagerði, Øksnagerði 1, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. november 2004.